## Molin í Havn verður »bjálvaður«

HAVNARVIÐURSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nevndin í Tórshavnar Havn, Havnarnevndin, hevur eisini samtykt at seta fýra fendarar á endan á molanum í Havn.

Hetta verður gjørt til tess at forða fyri, at stór skip, ið koma á Havnina, skulu fáa skaða av at bera við molan, um tað skuldi hent.

Trupult er at verja sjálvt hornið á molanum uttan fendarar, sum eru gjørdir til endamálið.

Avgjørt er tí at seta fýra fendarar á molan.

Arbeiðið kostar góðar 400 túsund krónur.

### Flótibrýr til útróðrarbátar

Tórshavnar Havn fer í næstum eisini at útvega tvær nýggjar bátabrúgvar at leggja út á vestaru vág.

–Hetta verður fyrst og fremst gjørt fyri at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum burturav liva av útróðri í høvuðsstaðnum, sigur Leivur Hansen, formaður í Havnarnevndini.

Sum er hava hesir menn onki fast bátapláss.

Leivur Hansen sigur, at ætlanin er at leingja »longubrúgv« –bátabrúgvin, ið liggur tvørtur um vágna – við teimum báðum nýggju bátabrúgvunum.

Hetta skuldi givið pláss til 14 stórar bátar.

Kostnaðurin fyri bátabrúgvar og útlegging er góðar 500 túsund krónur.

### Tryggari at ganga á bátabrúgvunum

Tá tað frystur um veturin, gerast flótibrúgvarnar sera hálar.

Á brúgvunum er onki at halda í, og er tí skjótt at vera áhaldsin.

Havnarnevndin hevur tí gjørt av at seta jarnverk eftir miðjuni á øllum flótibrúgvunum.

Nevndin hevur í hesum sambandi tikið av einum tilboði upp á uppseting av galvaniseraðum jarnverki uppá 150 túsund krónur.

Øll omanfyrinevndu arbeiði verða fíggjað av íløgukontuni hjá Tórshavnar havn.




*Tá tað ikki viðrar hjá Norrønu at leggja at inni við Bursatanga, skal hon í staðin leggjast í krókinum undir skipafelagnum*

# Norrøna inn í krókin

HAVNARVIÐURSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Tað skal nú eisini bera til hjá Norrønu at leggja at undir havnarskrivstovuni – ella inni í krókinum – í Havn, tá tað ikki eru líkindi at leggja at á plássinum við Farstøðina.

Hetta sigur Leivur Hansen, formaður í Havnarnevndini, sum samtykti hetta fyrr í vikuni.

Leivur hansen sigur, at hetta eisini er atløguplás hjá nýggja Smyrli, og í hesum sambandi hevur Tórshavnar Havn dýpt og umvælt rampuna har.

– Fyrsta dagin verður farið undir at byggja ein 75 ts. pullart til tess at bøta um umstøðurnar at binda skipini, soleiðis at eisini Norrøna kann leggja at har, tá tað verður hildið at vera neyðugt, sigur hann.

Har stendur eitt petti eftir av gamla molanum. Við at stoypa nakað aftrat hesum pettinum er møguligt at brúka hetta sum fundament til tann nýggja stóra pullartin.

Arbeiðið verður mett at kosta 100 túsund krónur.

## Næmingakonsert á Glyvrum

**Næmingarnir á tónleikabreytini framføra sjómanssangir, gamlir kærleikssangir og løg hjá m.ø. Jim Reeves, Cliff Richard og Beatles**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Skúlarnir í Runavík og á Toftum hava í felag eina tónleikabreyt. Síðsta skúlaár høvdu næmingarnir á breytini einar tríggjar almennar framførslur.

Eisini í hesum skúlaárinum er ætlanin, at næmingarnir skulu venja seg til at upptraðka fyri fólki, og tí fara teir at hava tvær framførslur í fimleikahøllini í skúlanum á Glyvrum, nevniliga týskvøldið 22. nov. og mikukvøldið 23. nov. - bæði kvøldini klokkan 20:30.

Týskvøldið er mest ætlað innbodnum, og tí má ein tryggja sær atgongumerki frammanundan. Næmingarnir eru spentir til tiltakið, og tað hevði glett teir, um fólk stukku inn á gólvið.

Á skránni eru gamlar sjómansvísur og gamlir kærleikssangir t.d. ”Det var en lørdag aften” og ”Hør min sang, du klare aftenstjerne”, og so sangir, sum vit hava hoyrt Jim Reeves, Cliff Richard, Elvis Presley, Beatles og ABBA syngja.

Fimleikahøllin verður stásað upp til tiltakið, og áhoyrararnir sita til borðs undir framførsluni og fáa ein drekkamunn og ein kakubita. Tað kostar bert 30 kr at koma inn, og til ber at bíleggja sær atgongumerki á tlf. 220958.



*Talan verður um tvær framførslur, sum næmingakórið hjá skúlunum í Runavík og Toftum fer at hava*

# Fríøki við Prestá á Skála

**Skálanevndin skipar mánakvøldið fyri borgarafundi um ætlanin at gera eitt fríøki við Prestá á Skála**

FRÍØKI



Eftir at hava fingið økið við Prestá til endamálið frá eigarunum, gjørdi seinasta kommunustýrið í Skála kommunu av at fara undir at gera fríøki úti við Prestá. Síðan samanleggingina við Runavíkar kommunu er arbeiðið lagt yvir í Skálanevndina, sum so hevur arbeitt víðari við málinum.

- Nú er komið so langt áleiðis, at lýst verður til kunnandi borgarafund í skúlanum á Skála mánakvøldið 21. november, klokkan 19.00, sigur Skálanevndin í tíðindaskrivi.

Tað er ein rættiliga stór og umfatandi ætlan, sum er sett út í kortið. Ætlanin er at gera økið til eitt savningarstað í hesum sera vakra og hugnaliga umhvørvi við sjóvarmálan, har møguleiki verður at skipa fyri tiltøkum av ymsum slagi.

- Av tí, at verkætlanin er so umfatandi, er ætlanin at gera eitt sindur í senn, og í summar er ætlanin at byrja at planta, at hampa um gøtuna út á Berjarheygg, og at gera gomlu brúnna um Prestá, sigur Skálanevndin.

Á fundinum mánakvøldið verður greitt frá allari ætlanini. Tá fer Tummas M. Jacobsen at greiða frá heildarætlanini og fer hann millum annað at leggja fram eitt uppskot, sum arkitektar gjørdu í 2002. Tróndur Leivsson, frá Skógrøkt landsins, verður við á fundinum í sambandi við ætlanina um planting, og Símun V. Arge, fornfrøðingur, verður eisini við á fundinum í sambandi við tey fornminni, sum eru í økinum.

Og tað er ikki so lítið, sum er knýtt at økinum. Prestá liggur í elsta partinum av bygdini; kirkja stóð har í sínari tíð, gamli bóndagarðurin stóð skamt har frá, sýslumaðurin helt til har og so búði Ormur bóndi eisini í sama grannalagi. Tí er hetta bæði eitt vakurt og eitt søguligt øki, sum bygdin nú fær sum savningarstað undir opnum himli.

Á fundinum verður høvi hjá fólki at tekna seg sum stuðul hjá hesi verkætlan, sum fyri ein stóran part er ætlað at verða framd við sjálvboðnum arbeiði. Skálanevndin ætlar at skipa fyri 2 ella 3 arbeiðsdøgum næsta summar, og annars kunnu fólk hvør í sínum lagi ella í smærri bólkum vera við at gera økið til.

Hóast ein verkætlan er til taks merkir tað ikki, at alt longu er lagt í fastar karmar. Tí verður høvi hjá fundarluttakarunum at koma við góðum hugskotum til ætlanina við Prestá.

Skálanevndin, sum skipar fyri borgarafundinum mánakvøldið, vónar, at bygdafólkið tekur væl undir við ætlanini, og at nógv møta upp til henda áhugaverda fund, sum verður í Skála skúla klokkan 19.00.